# H71

faldari 3

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN

# H71 - TEAM KLAKSVÍK

Leygardagin 25. oktober kl. 18.00

Hoyvíkshøllin



BONUS -er biligari!

J&K

SUÐUROYAR SPARIKASSI

Advokatfelagið Yviri við Strond

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR - so ert tú tryggari

P/F THOMAS DAM ÍTRÓTTARDEILDIN · N. Finsensgøta 5 · Tel. 31 14 03

polytan




Tú fært avsláttur av inngjaldinum til tínar privatu tryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, um tú hevur tvær ella fleiri privatar tryggingar hjá okkum. Fleiri tryggingar tú hevur, størri avsláttur fært tú.

Hevur tú inngjald til Betri pensjón á minst 10.800 krónur árliga, fært tú 20% í avsláttri av tínum privatu tryggingum hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, líkamikið um tú hevur 1, 2, 3, 4 ella fleiri privatar tryggingar.

**Tilsamans kanst tú fáa heilt upp til 32% í avsláttri**

*Set teg í samband við okkum á telefon 345600 ella tf@trygging.fo og fá eitt tilboð uppá tryggingar og pensjón.*

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR




Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**

# GONGD KOMIN
# Á KAPPINGARÁRIÐ



Nú heystfjøllini eru gingin, heystfrítíðin farin aftur um bak og kvøldini av álvara farin at leingjast, er veruliga gongd komin á hondboltsárið. Hetta eru alt árlig afturvendandi tekin um at so er. Fara vit aftur í tíðina hjá H71, var ikki so. Tá var fyrst av álvara farið undir at hugsavna seg burturav um hondbóltin nakað út á heystið og varð liðið so dánt samanspælt ímóti jólum. Flestu leikararanir hjá H71 vóru tá eisini fótboltsspælarar og kundu tí ikki spæla hondbólt burturav fyrr enn fótboltskappingin var liðug. Og fyri summar skuldi slagtið, og tað sum haruppí hongur, eisini fáast frá hondini, áðrenn teir kundi savna seg um hondbóltin – sum kunnugt, kunnu menn bert savna seg um eitt ting í senn.

### HVUSSU HEVUR BYRJANIN SO VERIÐ

Taka vit fremsta manslið okkara, so hava vit í ár í stóran mun valt at byggja á egið tilfar. Gamaní onkur styrkur er fingin uttanífrá, men er hesin ikki so eyðsýndur, sum hann hevur verið undanfarin ár. Eftir eina heldur trilvandi byrjan, má sigast at vera komin verðuliga gongd á. Fyrstu dystirnar í kappingini taptu vit, fyrst heima ímóti Neistanum og síðani úti ímóti VÍF. Næstseinasta vikuskifti bragdaði tó í og vunnu vit ein arbeiðssigur á Kyndli heima. Og hetta vikuskiftið vunnu vit aftur ein arbeiðssigur, hesuferð á KÍF í Kollafirði. Verjuspælið hevur hesar báðar seinastu dystirnar verið fyrimyndarligt og hava menn verðuliga arbeitt hvør fyri øðrum, eitt ein kanska hevur saknað nógvar dystir undanfarin ár. Í álopinum saknar ein kanska ein langskjútta, men hevur tó hilnast væl hjá álopsleikarunum, har meiri hevur verið lagdur dentur á at spæla seg ígjøgnum til málmøguleikarnar, heldur enn at skjóta útifrá. Leikarar, ið hava potentialið, hava av álvara tikið ábyrgd og sýnt hvør dugur er í teimum, og er tað ein fragd at síggja. Tá hetta er sagt, skal

*framhald á síðu 13*







Lundin Financials
Lundin Løn
Microsoft Dynamics
Trygg
fíggjarstýring
nema
SENDISTOVAN



NordikSOLO 18+
Kom best frá byrjan við NordikSolo
Ert tú millum 18 og 28 ár, kanst tú gerast NordikSolo kundi og fáa eina rúgvu av ókeypis tænastum og serliga góðum rentum.
Vitja www.banknordik.fo/solo og gerst NordikSolo kundi.
BANKNORDIK
SENDISTOVAN



Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara leskiliga vaniljukrem.
VANILJU
KREM
Nýggj vøra!
MBM
SENDISTOVAN



Pf. Jógvan Weihe
P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98
www.weihe.fo | weihe@weihe.fo


P/F Hjá Fróða
Jónas Broncksgøta 25
Tel 35 09 00
Fax 35 09 01
frodi@hjafroda.fo
Flügger


LM ELECTRIC
LM Electric bjóðar heildarveiting innan el-innlegging, ráðgeving og projektering
· El-innleggingar
· Ljós og talvur
· EDV-& telefonnet
· Hvítvørutænastu
· Døgntænastu
· Neyðstreymsskipanir Trygdarskipanir (ABA, ITV,AIA og ADK)
LM ELECTRIC - 100 TÓRSHAVN - HOYVÍKSVEGUR 53
TEL 35 12 20 - WWW.LM.FO - LM@LM.FO


Dekk
- sjálvandi frá Bilrøkt!
- Vit selja øll sløg og allar støddir
- Vetrardekk á sportsfelgum
- Vit hava helst besta prísin
- Góð tænasta og góðir prísir
- Bil or not to bil
bilrokt.fo
Ring 35 88 88 og bílegg tíð
Opið gerandisdagar frá 08.00 - 17.00
og leygardagar frá 10.00 - 13.00
Stiðjagøta 3 · FO-100 Tórshavn · Tel: 358880 · Mobil: 235880 · bilrokt@bilrokt.fo · www.bilrokt.fo


fk


Keyp ein Toyota - og fá ein 3 ára servicepakka
Ongar útreiðslur til viðlíkahald í 3 ár
REYNI SERVICE
tel. 35 30 40 - www.reyniservice.fo


WAAG & COMPANY
WAAG & Co. P/f
Hoyvíksvegur 63
110 Tórshavn
Tel: 31 36 66
waag@waagbilar.fo
www.waagbilar.fo
OPIÐ ER: MÁNADAG - FRÍGGJADAG: 8.00 - 17.00
WAAG & COMPANY

vistir.fo
haraldsen



Fá tær
Familju ískoyti
Ring 202020 ella skriva til
vodafone@vodafone.fo

Familju ískoyti til Vodafone RED
fyri hvørt barnið
29,- kr./mðr.

✓ Frí tala
✓ Frí sms
í familjuni

Við Familju ískoyti til Vodafone RED kunnu tit tosa og sms'a frítt í familjuni fyri einans **kr. 29,-** fyri hvørt barnið.

So kunnu tit kenna tykkum **trygg**, at tykkara barn fær samband við tykkum, eisini, tá ið eingin talutíð er á.

Les meira um familju ískoyti á **vodafone.fo**

Kaj Andreasen & Co
Handilin við tí fjølbroytta úrvalinum



TIT HAVA TØRVIN
VIT ERU VEITARIN.
Handilin við tí fjølbroytta úrvalinum.

Atlas Copco Quality

Atlas Copco

www.andreasen.fo

facebook.com/Kaj.Andreasen.Co

*framhald av síðu 4*



» ***Leikliga støðið í kappingini er kanska nakað lægri enn undanfarin ár, men botnstøðið tikist hægri og sær út til at øll lið kunnu taka stig hvør frá øðrum***

vera lagt afturat, at væl hevur gingið í fyrireikingunum til leikárið hjá fremsta liðnum og bæði undir venjingarlegu á Akureyri og til venjingardystir, eru vístar góðar taktir, ið kunnu boða frá, at vit eru við at vera har, at vit burturav hava tilfar í egnum rekjum til liðið í fremstu deildini. Og má tað í sær sjálvum vera eitt aðalmál hjá einum felagi sum H71, ið hevur so stóra og væl skipaða ungdómsdeild.

## ÚTLIT

Hvussu útlitini eru fyri árið er ilt at siga. Nógv óvantaði úrslit hava longu verið hesi fyrstu 4 leikumførini. Leikliga støðið í kappingini er kanska nakað lægri enn undanfarin ár, men botnstøðið tikist hægri og sær út til at øll lið kunnu taka stig hvør frá øðrum. Ikki haldi eg at nakar greiður favorittur er í løtuni, tó at eg haldi at VÍF hevur eitt ógvuliga sterkt og spennandi lið, ið helst kemur at røkka langt og at vera annað liðið í finalunum, bæði í steypa- og landskappingini. Heldur positiva gongdin hjá okkum fram, so vera vit kanska har tað er stuttligt at leika, men er ilt at spáa um tað sum er.

## DYSTURIN HESUFERÐ

Dysturin hesuferð er ímóti TEAM Klaksvík, sum við einum sigri á STÍF næstseinasta vikuskifti hava boðað frá, at teir skulu takast í avgjørdum álvara hetta leikár. TEAM Klaksvík hevur styrkt seg í ár. Umframt nýggjan útlendskan málverja, hava teir eisini okkara egan Bogdan Florea á liðnum hetta kappingarárið. Bogdan hevur valt at royna seg norðanfyri hetta kappingarárið og er hetta so fyrsti dystur hansara ímóti gomlu liðfeløgum sínum úr Hoyvík og verður spennandi at síggja, hvussu hann roynist í hesum nýggja leikliga umhvørvi. Í ár hava Bogdan og Simona fingið ein son og giftust tey eisini í summar, so hetta hevur verið eitt hendingaríkt ár fyri rumenska parið hjá okkum. Nú vóni eg at tey hava fingið tær gávur tey skulu hava frá H71 í tí sambandi, tí ætlanin er sanniliga ikki at dysturin í dag, skal vera nøkur gávubúð til Bogdan og nýggju liðfelagar hansara úr fiskivinnuhøvuðsstaðnum.

# –VIKAN VERÐUR LØGD TIL RÆTTIS RUNDANUM H71!




**UTTAN ALT TAÐ SJÁLVBODNA ARBEIÐIÐ HJÁ FORELDRUM OG ØÐRUM ÁHUGAÐUM, HEVÐI HELST MANGAN SANSAÐ AT HJÁ FØROYSKU ÍTRÓTTARFELØGUNUM. OG H71 ER EINKI UNDANTAK. NÓGV ERU TEY, SUM LEGGJA ÓTELJANDI TÍMAR Í ARBEIÐIÐ, OG SUMMI SKARA FRAMÚR.**

Millum teirra, sum brúka ein ómetaliga stóran part av sínum vaknu tímum uppá hjartabarnið, H71, eru Anna í Horni og Petur Sivertsen. Øll, sum hava sína gongd í Hoyvíkshøllini, kennast við tey bæði.

Uttan mun til, hvørja deild talan er um, sær Petur so gott sum allar dystir, sum H71 spælir. Um tað er AA ella fyrsta deild, har sonurin, Andor spælir, ella um tað eru D10 ella G10, er hann íðin áskoðari.

– Eg blívi so kókandi heitur og eg geri nokkso nógv fyri at sleppa at síggja allar dystir, viðgongur Petur, flennandi sín eyðkenda og smittandi látur.

Tey bæði – Funningsmaðurin og Sandavágskonan, sum gjørdust hoyvíkingar – hava verið virkin í H71 síðani sonurin, Andor, fór at spæla hondbólt saman við vinmanninum, Jónasi ( G Djurhuus ) tá teir vóru smáir.

Ífjør spældi eisini ein ommu- og abbasonur við H71, men hann er nú fluttur til Grønlands, so hann fáa tey tíverri ikki heppað hetta kappingarárið.

## UPPILAGSTUR

Petur, sum hevur siglt í Alaska síðani 1979, hevur júst gjørt av at fara í land. Freistandi at spyrja, um avgerðin hevur nakað við H71 at gera? Tað er kanska nakað nógv sagt, heldur Petur, tí hóast hann hevur verið burturi stóran part av árinum, hevur altíð eydnast honum at síggja allarflestu dystirnar. Ífjør sá hann sostatt allar dystirnar í AA-deildini, uttan tann fyrsta.

Tað verður í øllum førum annað lívið ikki at skula umborð aftur, og munnu ikki nakrir tímar fara at falla afturat teimum mongu til felagsarbeiðið?!

## STUÐLAFELAGIÐ

Anna hevur verið í Stuðlafelagnum seinastu 9-10 árini, og har hevur hon skipað fyri nógvum tiltøkum at fáa pening til felagið.

Av stórum tøkum kunnu nevnast Heystblaðið, sum kom út fyri nøkrum árum síðani, árliga jólahaldið, Hurlumhey og Eydnuhjólið og faldarin, sum verður borin í øll hús í Hoyvík undan heimadystunum.

Sjálvt hjólið til fyrsta Eydnuhjólið fekk Anna eisini skaffað. Hon ringdi út á Tekniska Skúla við einum fyrispurningi: Var ikki onkur flokkur á skúlanum, sum kundu fáa ta uppgávu at snikka til eitt eydnuhjól? Tað var gamaní, og tá hjólið stutt eftir kom niðan í Hoyvíkshøllina, var tað Benny, sum umframt at undirvísa á Tekniska Skúla, eisini er H71 pápi, sum kom við tí! Tað helt Anna vera stuttligt, tí tað sigur eitt sindur um, hvussu nógv fólk onkursvegna eru tengd at felagnum.

Arbeiðið við dystarfaldaranum liggur í fastari legu og fólk hava fingið sínar føstu rutur at ganga. So eftir er bert hjá Peturi at syrgja fyri, at faldarin verður koyrdur til teir føstu útberarnar.

Millum uppgávurnar hjá Stuðlafelagnum plagdi at vera at skaffa bakstur til kaffisøluna, antin at ringja runt at fáa fólk at baka, ella – sum oftast – at baka sjálv.

Hetta er eitt sindur broytt nú, sigur Anna. Tí nú ymisku deildirnar og liðini hava ábyrgd

» *Um tað er AA ella fyrsta deild, har sonurin, Andor spælir, ella um tað eru D10 ella G10, er hann íðin áskoðari.*




av at koma við køkum, er hetta blivið lættari. Men nógvir kaffikoppar fara framvegis ikki um skivuna í Hoyvíkshøllini, uttan at Anna hevur ein fingur við í spælinum.

– Organiseringin er tað mesta arbeiðið, siga Anna og Petur, sum hava lagt óteljandi arbeiðstímar í part um vikuna í H71. Er Anna ikki til arbeiðis um vikuskiftið, verða leygardagur og sunnudagur brúktir í høllini.

Anna dylir heldur ikki fyri, at hon hevði ynskt, at fleiri fólk vóru í Stuðlafelagnum, tí tað hevði gjørt arbeiðið lættari og hevði samstundis komið okkara børnum og ungu tilgóðar!

## H71 VEÐRURIN ÚR FUNNINGI

Umframt tað praktiska arbeiðið, sum Anna og Petur gera í sambandi við Eydnuhjól, faldarar, kaffisølu og mangt, mangt annað, hevur Petur meira enn einaferð funnið uppá eitt sindur alternativar mátar at fáa pening til vega.

Soleiðis var til dømis, tá hann fyri fáum árum síðani var á floti tað mesta av einari viku og fekk væl av fiski. Saman við smádreingjunum – Andor, Helga og Jónasi – skar hann flak, sum fylti so nógv, at teir fingu pláss at frysta hjá Kollafjørð Pelagic.

Flakið bleiv so selt, og H71 og Stuðlafelagið gjørdust einar 20 túsund krónur ríkari.

Í Funningi hevur Petur eisini hús og jørð, og har fæst hann við seyð.

Á hvørjum ári flettir hann ein veðr, sum verður limaður sundur og lutaður burtur, tá Eydnuhjólið er. Hetta eru vælumtóktir vinningar, og lutaseðlarnir ganga sum heitt breyð.

## STRÆVIÐ, MEN NEYÐUGT!

Anna ásannar, at hjartabarnið stundum kann vera eitt sindur strígglð at fáast við, men er tó púra samd við Peturi um, at hetta arbeiðið er alneyðugt. Tey halda, at eitt sera stórt sosialt arbeiði verður gjørt í H71:

– Hvar høvdu øll hesi børnini og tey ungu gingið og malið, vóru tey ikki í høllini, spyrja tey sum við ein munn.

Anna fer brádliga at hugleiða um alt tað, hon og Petur høvdu havt stundir til, var tað ikki fyri H71: So høvdu tey kunnað gingið til alt møguligt, sosum konsertir og annað.

– Ikki eg! Er Petur skjótur at bróta frúuna av, og leggur afturat: H71 er tað einasta, eg gangi til!

Eingin ivi er um, at funningsmaðurin, Petur, og hansara Anna úr Sandavági, hava fest røtur í Hoyvík, og hava tikið H71 til sín. Og tað kunnu øll vit, sum eru góð við H71 bara gleðast um!

Hetta kvøldið tíðliga í heyst, vit hava sitið og prátað og fingið ein themunn í hugnaliga køkinum hjá Onnu og Peturi millum Gilja, er Petur farin at gera seg út til dagin eftir. Tá fara hann og Gunnar norður til Funnnings:

– *Vit mugu fara norður, tí nú skal H71-veðrurin flettast!*

J&K

ÆTLAR TÚ AT STOYPA?

Tosa fyrst við okkum.

Framkomna, teldustýrda betong-blandiskipanin syrgir fyri, at tú kanst vera heilt vísur í, at tú fært betong av allarbestu góðsku bæði til nýtslu á landi og undir vatni
Blandi- og pumpubilar okkara bera so í bandi, at útkoyring og fylling í formar v.m. ikki er nakar trupulleiki - heldur ikki um tvørligt er at sleppa framat.

Vit koyra um alt landið og eru kappingarførir í prísi!




J&K

J & K Betong

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25




Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

SENDISTOVAN

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO



## Takk fyri at tú stuðlar Javna

### Gerst limur í Javna

Far inn á okkara heimasíðu www.javni.fo, trýst á leinkjuna „Tekna teg sum lim" og fylg vegleiðingini.

Hevur tú brúk fyri hjálp í sambandi við tilmeldingina, ring so til Javna á telefon 208090 ella 514827.

### Gerst stuðul hjá Javna

Ynskir tú at stuðla okkum við einari fastari upphædd hvønn mánað, far inn á heimasíðuna www.javni.fo og trýst á leinkjuna „Stuðulsgjald" og fylg vegleiðingini.

Hevur tú brúk fyri hjálp í sambandi við tilmeldingina, ring so til Javna á telefon 208090 ella 514827.

javni
Hoydalsvegur 40/Loftið
FO-100 Tórshavn
Tel +298 208090
javni@javni.fo
www.javni.fo



polytan®
simonsen@polytan.dk
tlf: 0045 39405420
fax: 0045 26745420
polytan ligaturf 240/el-25
FIFA 2 stjørnu góðkent




Stílurin er tín, næstan alt ber til. Folia fæst í øllum litum og kann skerast út til búmerki, myndir ella tekst. Bilurin á myndini hevur carbon foliu á takinum og síðuspeglunum.

Føroyaprent
Tel. 314555 www.foroyaprent.fo










www.torshavn.fo



Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR KOMMUNA




Netbankin Tablet er komin

Eik Banki P/F
Tel. 348000
www.eik.fo

"Netbankin Tablet gevur mær frælsi og tíð til at gera tað,
sum eg havi bestan hug til."
– Bjørk Herup Olsen, rennari

Avgreið tíni fíggjarligu viðurskifti - uttan mun til tíð og stað. Netbankin Tablet er tann sami sum netbankin á telduni, uttan nakrar fáar funkur.

Netbankin Tablet riggar við iPad og Android teldlum, og er ókeypis at stovna og hava.

HH = Hoyvíkshøllin FH = Fimleikahøllin í Hoyvíkar Skúla SvL = Skúlin við Løgmannabreyt

| Kl | Mánadag | Týsdag | Mikudag | | Hósdag | Fríggjadag | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | HH | HH | HH | SvL | HH | HH | SvL |
| 14:00 | G10 | | D12 | | G10 | D10 | |
| 14:30 | G10 | | D12 | | G10 | D10 | |
| 15:00 | U8 | D10 | D12 | | D10 | D14 | |
| 15:30 | U8 | D10 | D12 | | D10 | D14 | |
| 16:00 | G12 | D12 | U8 | G10 | D12 | | |
| 16:30 | G12 | D12 | U8 | G10 | D12 | | |
| 17:00 | G14 | D12 | G12 | U6 | D12 | G12 | |
| 17:30 | G14 | D12 | G12 | U6 | G14 | G12 | |
| 18:00 | G14 | G14 | D14 | | G14 | | |
| 18:30 | D16/18 | G14 | D14 | | AA | | |
| 19:00 | D16/18 | G14 | D14 | | AA | D16/18 | |
| 19:30 | D16/18 | G17 | AA | | AA | D16/18 | |
| 20:00 | D14 | G17 | AA | | D16/18 | | |
| 20:30 | D14 | AA | AA | | D16/18 | | |
| 21:00 | G17 | AA | D16/18 | | G17 | | |
| 21:30 | G17 | AA | D16/18 | | G17 | | |
| 22:00 | G17 | | D16/18 | | G17 | | |
| 22:30 | | | | | | | |

| Deildir | Viðmerkingar |
|---|---|
| AA | |
| D16/18 | |
| D14 | |
| D12 | |
| D10 | |
| G17 | |

| Deildir | Viðmerkingar |
|---|---|
| G14 | |
| G12 | |
| G10 | |
| U8 | |
| U6 | |

VENJARAYVIRLIT H71 KAPPINGARÁRIÐ 2013/2014

| Deild | Heiti | Navn | Telefon | Teldupost |
|---|---|---|---|---|
| AA/1.deild | Høvuðsvenjari | Petur Mittún | 218284 | peturmittun@gmail.com |
| | Høvuðsvenjari | Halgir Dahl Olesen | 235940 | halgirdahlolesen@gmail.com |
| | Kroppsligur venjari | Snorri Patursson | 299528 | snorripatursson@hotmail.com |
| AA | Liðleiðari | Lars Tornefeldt | 266287 | lars_tornefeldt@hotmail.com |
| | Hjálpari | Rene Dahl Olesen | 235930 | renedahlolesen@gmail.com |
| | Málmansvenjari | Jens á Skipagøtu | 280325 | skipagota@gmail.com |
| D16/D18 | Høvuðsvenjari | Mark Marcher | 503997 | marci604@hotmail.com |
| | Hjálparvenjari | Rúni Højgaard | 261415 | runi_hoyvik@hotmail.com |
| | Hjálparvenjari | Hallur Biskupstø | 549096 | hillar_1993@hotmail.com |
| | Hjálparvenjari | Ári Jógvansson Olesen | 595047 | Arijolsen90@gmail.com |
| | Hjálparvenjari | Gunnar Djurhuus | 219082 | gunnardjurhuus@gmail.com |
| D14 | Høvuðsvenjari | Jónas G. Djurhuus | 506996 | jonash71@gmail.com |
| | Hjálparvenjari | Djóni Gaard Joensen | 504488 | djgajol@hotmail.com |
| D12 | Høvuðsvenjari | Mark Marcher | 503997 | marci604@hotmail.com |
| | Hjálparvenjari | Karl Oddmar Rasmussen | 508338 | karlor@live.dk |
| | Hjálparvenjari | Gilli Wardum | 220505 | gilli.wardum@gmail.com |
| | Hjálparvenjari | Petur Mittún | 218284 | peturmittun@gmail.com |
| | Hjálparvenjari | Andor Sivertsen | 589401 | andor95@gmail.com |
| | Hjálparvenjari | Hans Kári Hansen | 264826 | hanskari@hotmail.com |
| D10 | Høvuðsvenjari | Mark Marcher | 503997 | marci604@hotmail.com |
| | Hjálparvenjari | Djóni Gaard Joensen | 504488 | djgajol@hotmail.com |
| | Hjálparvenjari | Pætur Thomsen | 509866 | paturthomsen@hotmail.com |
| | Hjálparvenjari | Poul Símun Niclasen | 503769 | poulsimun@hotmail.com |
| G17 | Høvuðsvenjari | Petur Martin Johansen | 296260 | billutir@billutir.fo |
| | Hjálparvenjari | Tróndur Arge | 262634 | trondurarge@hotmail.com |
| G14 | Høvuðsvenjari | Jakob Jónsson | 764679 | jakob@pm.fo |
| | Hjálparvenjari | Helgi H. Hoydal | 503850 | helgihoydal@gmail.com |
| | Hjálparvenjari | Hallur Danielsen | 231983 | hallur@hsf.fo |
| G12 | Høvuðsvenjari | Hendrik Egholm | 237410 | hendrik@magn.fo |
| | Hjálparvenjari | Annika Thorsvig | 217844 | annikath@torshavn.fo |
| G10 | Høvuðsvenjari | Mark Marcher | 503997 | marci604@hotmail.com |
| | Hjálparvenjari | Hallur Danielsen | 231983 | hallur@hsf.fo |
| U8 | Høvuðsvenjari | Mark Marcher | 503997 | marci604@hotmail.com |
| | Hjálparvenjari | Fróði Niclassen | 583769 | frodi-96@hhotmail.com |
| U6 | Høvuðsvenjari | Bjørg Djurhuus | 215490 | bjd2406@gmail.com |
| Ungdóms | Málmansvenjari | Ári Egason Dam | 512090 | aed@eik.fo |








Myndir: Jan Nielsen








# H71 GOTT HÁL TIL NIGHT CUP

**ENN EITT VÆL EYDNA ADIDAS NIGHT CUP Í VESTMANNA ER FARI AFTUR UM BAK.**

Longu fríggjamorgunin kl 10 var byrja við yngstu gentunum og dreingjunum og endað var við einum finalubrakið leygarmorgunin kl 07. Eitt tiltak við 96 dystum, áleið 480-500 leikarum, spenningi, gleði og møði til seinasta dyst. Tiltakið var væl skipað og rós til Víf fyri tað.

Okkara dreingir 10 ár vunnu fyrsta steypið til Hoyvíkar fríggjadagin og seinri um kvøldið vunnu bæði dreingir og gentur 12 ár sínar finalur í tøttum dystum millum annað við umdysti hjá dreingjum 12. Okkara dreingir 14 ár vóru ov stuttir og taptu semifinaluna men okkara gentur 14 ár vunnu soleiðis at H71 fór aftur til Hoyvíkar við 4 av 6 steypum.

Myndir: Jan Nielsen










# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT



ADVOKATSKRIVSTOVAN

Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv.
Birita S. Samuelsen, adv.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO

SENDISTOVAN







# h71 klæðini 2014/15




Vælkomin inn á gólvið hjá okkum
... her finnur tú altíð okkurt!
pf Skálabúðin
DR. JACOBSENSGØTA · TEL. 315 315


Matstovur keypa gass og køksútbúnað
frá
p/f Sveisingahandilin
Mykinesgota 8 · FO-100 Tórshavn · Tel 311909


SKORA VIÐ SISU
SISU
Föroya Bjór

FAROE SHIP

# SPEKT kann hjálpa tær við




sansir.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar

Gullpakkin við keypi av nýggjum bili

## Við Gullpakkanum vinnur tú hvørja ferð

**Tá tú keypir nýggjan bil frá Auto Service, fylgir Gullpakkin við, sum ger at tú sleppur undan at hugsa um útreiðslur til viðlíkahald og eftirlit av bilinum næstu trý árini.**





*Heðin Weihe, verkstaðsleiðari*

Visti tú av, at tú eigur, sambært framleiðaranum av bilinum, í minsta lagi einaferð um árið til eftirlit við bilinum fyri at varveita garantiið ?

Somuleiðis mást tú skifta olju í mun til, hvussu nógv tú koyrir, perur fara, sprinklaraveska skal fyllast á so hvørt, og so alt annað, so sum bremsur, útstoyt og stoytdoyvarar kunnu fara.

Alt hetta kann gerast til heilt fitt av peningi. Men við Gullpakkanum, sum fylgir við, fært tú alt hetta fyri einki..! Ja, í veruleikanum fært tú ein mekanikara við eykalutum í 3 ár ella til tú hevur koyrt 90.000 km, við í prísinum, tá tú keypir nýggjan bil frá okkum.

Vælkomin til eitt gott bilakeyp.

**Í Gullpakkanum fært tú:**

- Eftirliti og viðlíkahald av bilinum og harafturat allar neyðugar umvælingar
- Arbeiðsløn, eykalutir sum t.d. perur, viskarabløð og neyðugar veskur og viðlíkahalds- og umvælingararbeiði.
- Tað vil siga: **Ongar viðlíkahalds-útreiðslur komandi trý árini!**

Sí treytir á www.autoservice.fo

Auto Service
www.autoservice.fo

Undir Krákugjógv 19 - Postboks 3168 - 100 Tórshavn - Tel 34 54 00 - as@autoserice.fo

BYGMA
BALSLEV

samskip
Saman røkka vit málinum

yviri við Strond 23 – Postbox 3255 – Tel. 30 88 00 – Fax. 30 88 01 – www.samskip.com



amr.fo
SENDISTOVAN

# TEY SVØRTU TØLINI

## DYSTARYVIRLIT HJÁ H71 Í ATLANTIC AIRWAYS DEILDINI

| Dato | Heimalið | Útilið | Úrslit |
|---|---|---|---|
| 28.09.2014 | H71 | Neistin | 24-27 |
| 08.10.2014 | VÍF | H71 | 25-22 |
| 11.10.2014 | H71 | Kyndil | 19-18 |
| 19.10.2014 | KÍF | H71 | 19-23 |
| 25.10.2014 | H71 | T. Klaksvík | |
| 02.11.2014 | StÍF | H71 | |
| 06.11.2014 | Neistin | H71 | |
| 16.11.2014 | H71 | VÍF | |
| 19.11.2014 | Kyndil | H71 | |
| 30.11.2014 | H71 | KÍF | |
| 05.12.2014 | T. Klaksvík | H71 | |
| 13.12.2014 | H71 | StÍF | |
| 20.12.2014 | H71 | Neistin | |
| 01.02.2015 | VÍF | H71 | |
| 15.02.2015 | H71 | Kyndil | |
| 18.02.2015 | KÍF | H71 | |
| 25.02.2015 | H71 | T. Klaksvík | |
| 28.02.2015 | T. Klaksvík | VÍF | |
| 01.03.2015 | StÍF | H71 | |
| 01.03.2015 | KÍF | Kyndil | |
| 07.03.2015 | T. Klaksvík | Kyndil | |
| 08.03.2015 | StÍF | VÍF | |
| 08.03.2015 | Neistin | H71 | |
| 18.03.2015 | H71 | VÍF | |
| 22.03.2015 | Kyndil | H71 | |
| 29.03.2015 | H71 | KÍF | |
| 01.04.2015 | T. Klaksvík | H71 | |
| 04.04.2015 | H71 | StÍF | |

## STØÐAN ATLANTIC AIRWAYS DEILDIN

| Nr. | Lið | Dystir | V.m | T.m. | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 5 | 117 | 123 | -6 | 7 |
| 2 | Kyndil | 4 | 98 | 76 | 22 | 5 |
| 3 | VÍF | 3 | 77 | 59 | 18 | 4 |
| 4 | H71 | 4 | 88 | 89 | -1 | 4 |
| 5 | KÍF | 4 | 105 | 106 | -1 | 4 |
| 6 | StÍF | 4 | 98 | 109 | -11 | 2 |
| 7 | T. Klaksvík | 4 | 102 | 123 | -21 | 2 |

# LIÐINI HESUFERÐ

## H71

**Málmenn:**

1 Ári E. Dam
12 Hanus Kristiansen

**Útileikarar:**

2 Helgi Hildarson Hoydal
3 Mark Lausen-Marcher
4 Rúni West Højgaard
5 Bogi Gaard Davidsen
7 Hallur Biskopstø
8 Oddur Bech
9 Hans Kari Hansen
14 Sigmundur Dahl
15 Sigmundur Nolsø
17 Andor í Horni
18 Jesper Pedersen
19 Tróndur Arge
20 Djóni West Højgaard

*Venjarar:*
**Halgir Dahl Olesen**
**Petur Mittún**
*Málmansvenjari:*
**Jens á Skipagøtu**
*Liðleiðarar:*
**Lars Tornefeldt**
**Rene Dahl Olesen**

## Team Klaksvík

**Málmaður**

12 Dragan Kondic

**Útileikarar**

2 Leivur Petersen
4 Rudolf Eliasen
6 Beinur Heðinson
8 Danjal Kjørbo
9 Heri Johnsson
13 Bogdan Florea
15 Beinir Johannesne
21 Ari Magnussen
22 Vilhelm Vilhelmsen
23 Andrias Ellinsgaard
24 Sámal á Tjaldrfløtti
27 Dusko Petrusic
Suni Johannesen

*Bonkur:*
**Svein Rógvi Nielsen Ljósstein**
**Sylvan Jakobsen**
**Tina Rasmussen**


**Ítróttarfelagið Hoyvík H71**
Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067
188 Hoyvík · www.h71.fo

**NEVND**
Sunneva Jakobsen, forkvinna
231115, sunneva@liv.fo

Gunn Ellefsen, næstforkvinna
593040, ge@lawfirm.fo

Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

Anna Dam, 519082
ad@lawfirm.fo

Rene Dahl Olesen, 235930
renedahlolesen@gmail.com

Emy Sólvitsdóttir, 513769
emys@olivant.fo

Bergtóra Høgnadóttir, 286011
bergtorajoensen@gmail.com

Janet Fríða Johannesen, 212211
jjoh@olivant.fo

**ÁBYRGD AV FALDARA**
Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

**ÁBYRGD AV HEIMASÍÐU**
Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

**SNIÐ, UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ**
Pf. Føroyaprent, www.foroyaprent.fo
– svanamerktur prentlutur 541 705

**MYNDIR**
Jan Egil Kristiansen, 26 22 40

**ÚTGEVARI**
H71

»GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«



ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR
JULIANNA KLETT · JOHAN J. LAMHAUGE